gamlar fotomyndir frá Haldane. Ein av teimum er við í greinini í dag, og hon er júst frá ein slíkari vitjan á Sundi. Myndateksturin lýsir hvørjir persónarnir eru. Men afturat tí hava vit fingið áhugaverdar upplýsingar frá avvarðandi at hesum myndum, og eru tær frá Tóru Bærentsen, Janus Mohr, og systkinabørnunum Zakarias Wang og Marionnu Debes Dahl. Mia var mostir Marionnu og fastur Zakarias. Umframt eru tvey systkin hjá ommu teirra á myndini, og eru tað Ingeborg og Olaf Mohr.




*Hendan áhugaverda myndin er helst tikin í 1935, og er hon ein góð lýsing av lívinum á Sundi, soleiðis sum Jakku greiðir frá. Persónarnir eru:*
***Aftara rað f.v.*** *Jakku Reinert, høvuðsfrásøgumaðurin til hesa frásøgn, Hans Bærentsen, bóndasonur og seinni bóndi á Sundi, Olaf Mohr úr Hoyvík, helst Hjalgrim Jensen úr Skopun, sum plagdi at vera í Norðradali og Maja á Reyni, sum er systkinabarn Olaf og Ingeborg Mohr.*
***Fremra rað:*** *Dánjal Jákup, kallaður Baggu, bóndasonur á Sundi, Gullborg Vang úr Kaldbak, Andrias Reinert, gamli bóndin í Norðradali, Ingeborg Mohr á vitjan úr Amerika, Mia Vang, lærari og Óli Olsen, sum Mia seinni giftist við. Hesi eru umrødd í greinini.*
*Jakku heldur, at myndin er tikin beint omanfyri har SEV verkið er.*

## Ingeborg

Ingeborg hevði eina serliga søgu:

Hon fór til Skotlands á ungum árum, og har lærdi hon seg at tosa enskt. Hon kom væl fyri, var kamargenta hjá eini ríkari konu, sum var sera góð at vera hjá.

Hon fór sjálvboðin upp í herin – tað var helst tann amerikanska - undir 1. veraldarbardaga fyri at hjálpa teimum særdu. Har er tað, at hon møtti tí manni, sum hon giftist við. Hann var amerikanari, og tey fluttu til USA. Hann var ríkur, og eftir at hon varð gift við honum, var tað, at hon kom mest sum á hvørjum ári til Hoyvíkar. Børn fingu tey ongi.

Á eini ferð til Føroya gjørdist maðurin sjúkur. Tað var ein magasjúka, og tey hildu, at hann hevði fingið hana umborð á ferðamannaskipinum, tí honum dámdi so væl at drekka ókókað vatn. Hann kom á sjúkrahúsið her og varð sendur til USA, og har doyði hann. Ingeborg var ung einkja, og hon giftist ikki uppaftur. Hon var væl fyri fíggjarliga, og tí kundi hon koma so ofta til Føroya. Serliga væl dámdi henni at fara út at dyrgja millum Nakkin og Flesina. Hon sigldi altið, tí hon vildi ikki flúgva. Men í 1956 slapp hon ikki undan at fara við flogfari, tí skipið, hon ferðaðist við, Stockholm, rendi á Andreu Doriu 25. juli 1956, túrin eftir, at hon var komin higar. Skaðin var so stórur, at skipið ikki var liðugt umvælt, tá ið hon skuldi heim.

Síðstu ferð hon var í Føroyum var í 1964, og var hon framvegis púra klár og sera stuttlig at vera saman við.

Marianna Debes Dahl hevur í bók síni »Úti á leysum oyggjum« eina stuttliga frásøgn um eina ferð, hon minnist ommusystrina vera komna heim úr Amerika at ferðast. Hetta var jú ein sera forkunnug vitjan við hesi smartu ommusystrini, sum var ein rættilig verðinsdama. Og so ikki um tala alt góðgætið, hon hevði við, sum til dømis tyggigummi, sum tey ikki høvdi sæð fyrr.

## Maja

Maja á Reyni er dóttir Malvinu f. Mohr, fødd í Hoyvík 11. august 1851. Malvina giftist við Jens Egholm (1851-1912), sum var skómakari og búði úti á Reyni í Havn. Malvina doyði 21. juli 1923. Móðir hennara, Marin Pólsdóttir av Oyri, var einkja eftir Mourits Mohr, og áttu tey 11 børn, men eitt doyði sum smábarn, áðrenn faðirin doyði í 1857. Mourits var ein teirra, sum var saman við Pløyen minniliga túrin í Hetlandi í 1839. Í áttatiárunum flutti Marin til dótrina í Havn og doyði har 28. august 1907, 90 ára gomul.

Maja var systkinabarn Olaf og Ingeborg Mohr. Hon var eisini systkinabarn Kjartan Mohr, og maður hennara, Hans á Reyni, gjørdist bókhaldari á Tórshavnar Skipasmiðju. Jógvan Dahl, sum er kendur frá Faroe Boys, er ommusonur hennara. Maja er vaksin upp saman við ommu síni, og tí ber tað til, at hon er saman við systkinabørnunum úr Hoyvík inni á Sundi í 1935.

Hans varð valdur inn í Tórshavnar býráð á sjálvstýrislistanum á valinum 21. desember 1912, afturvaldur 22. desember 1916, 29. desember 1920 og 29. desember 1924.

Hann legði sess sín niður tann 23. september 1927, og tá kom Zacharias Heinesen inn fyri hann.

## Gullborg

Gullborg er systir Miu, lærarinnuna sum greitt er frá, var fødd í Soylgørðum í Kaldbak tann 15. mai 1916. Foreldur hennara vóru bóndahjúnini Sakaris í Soylgørðum [Zacharias Pauli Vang] og Marin hústrú hansara [Maren Mohr, fødd í Hoyvík]. Tey fingu sjey børn, og var Gullborg ynskt.

Gullborg var ein sonn kaldbakskona. Hon treivst onga aðra staðni enn í heimbygdini, og giftist hon eisini í Kaldbak. Maður hennara var Diss, bóndi Frammi í Stovu við Á.

Gullborg og Diss fingu trý børn, sum øll búgva við Á. Jákup Andrias, uppkallaður eftir faðir Diss, er elstur. Marin, uppkallað eftir móður Gullborg, var miðlingabarnið og gjørdist sjúkrasystir. Bartal, uppkallaður eftir abbabeiggjanum, sum doyði í bestu árum, gjørdist sveinur í smíði og hevur nú festið.

Tíðliga misti Diss heilsuna og doyði alt ov tíðliga. Nøkur ár seinni giftist Gullborg uppaftur við ti ediliga manninum Andrias á Mýruni, og fingu tey eina góða tíð saman, áðrenn hann doyði.



*Kaldbaksfjørður við parti av farleiðini til Norðradals. Myndin er tikin av Sornfelli.*

## Olaf

Olaf Mohr var føddur í 1895 og doyði í 1969. Hann var yngstur av teimum 10 børnunum – sjey gentum og trimum dreingjum – hjá bóndahjúnum í Hoyvík, Petur Mohr (1842-1920) og Elsebeth Mariu f. Olsen úr Hvalba (1855-1945).

Olaf var tann einasti, sum reisti egið búgv í føðibygdini. Hann giftist við Haraldinu (Dinnu) f. Egholm úr Kvívík. Tey fingu trý børn, men tvey av teimum doyðu av sjúku í ungum aldri. Sonurin, sum livir eftir, er Janus Mohr

Frá tí at royndarstøðin byrjaði virksemi sítt í 1921 og restina av sínum arbeiðslívi, starvaðist Olaf har. Hevði so mikið av bønum hjá bóndanum, Mouritsi, bróðuri sínum, til brúks, at hann kundi hava upp til trý neyt.

Olaf var ávirkaður av háskúlarørsluni, og sjálvur næmingur á Føroya Fólkaháskúla 16 ára gamal. Sangglaður sum hann var, var tann danska háskúlasangbókin honum ein sannur dýrgripur. Upptøkur eru til skjals av nógvum av tí, hann mintist pápa sín hava sungið.

## Komandi partur

Í komandi blaði verður greitt meira frá lívinum á Sundi, eins og tað verður ein frásøgn frá bóndagarðinum.

Sosialurin